

Leyst starv

## Dagstovnurin á Hamrinum søkir køksfólk

Vit søknast eftir køksfólki at arbeiða 15 - 20 tímar um vikuna, at byrja 13. august ella eftir nærri avtalu.

Vit ynskja til dømis eina ommu, sum dámar væl at gera mat, og sum við bakstri hugnar um í køkinum. Tú skal vera góð við børn og dáma at práta við tey, tá tey vitja teg í køkinum.

Tú skal gera millummála til 64 børn og døgurða av og á. Arbeiðið er sjálvstøðugt, men tú fær vegleiðing við at gera matarætlan og innkeypið. Tú hevur møguleika at ávirka arbeiðstíðirnar.

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú seta teg í samband við Elisabeth Henriksen leiðara, ella Oddvør Poulsen varaleiðara á tlf. 322003 ella 225784

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við møg. viðmælum, skal vera
Dagstovninum á Hamrinum
Glyvursvegur,
160 Argir
í hendi seinasta lagi mánadagin 6. august 2007.

Tórshavnar kommuna



Leyst starv

## Pedagogur til Frítíðarskúlan Smílibýlið

Vit í Smílibýlinum søkja eftir einum dugnaligum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna. Tú byrjar at arbeiða 13 august ella eftir nærri avtalu.

Í Smílibýlinum ganga 49 fitt børn, og vit hava 5 dugnalig fólk í starvi.

**Vit vænta at tú:**
- Dugir at arbeiða sjálvtøðugt og tekur ábyrgd.
- At tú ert arbeiðsamur og dugir at vísa umsorgan.
- Og so hevði tað verið gott, um tú hevur humor.

**Okkara gerandisdagur er soleiðis:**
Vit heinta børnini tá tey hava frí. Tá børnini koma í frítíðarskúla,. eta tey matpakka, og síðani fara vit og børnini í gongd við ymiskt virksemi.
Vit vilja fegin geva børnunum frælsi undir ábyrgd. Talan er um frítíðina hjá børnunum. Tí er spæl og annað virksemi sjálvboðið, tó undir okkara ábyrgd og hjáveru.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Barbaru Dahl leiðara tlf. 214879 ella Joan Heinesen á tlf. 210646.

Umsóknir skulu sendast til:
Frítíðarskúlan Smílibýlið
Stoffalág 82
100 Tórshavn

í seinasta lagi 6. august 2007.

Tórshavnar kommuna

Skúlin á Ziskatrøð
Postboks 53 · FO-700 Klaksvík

# Varaskúlastjóri

Starvið sum varaskúlastjóri í Skúlanum á Ziskatrøð verður lýst til setanar í eitt 5 – áraskeið, frá 1. august 2007

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlastjórans og í samstarv við hann, starvsfólk og samstarvspartar skúlans annars skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðslu og virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka við avbjóðingum og broytingum og taka á seg uppgávur í samstarvi við skúlastjóran
- leggur dent á stundvísi, fakliga og námsfrøðiliga menning.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans og saman við honum átaka sær fyristingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu verða skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi Mánadagin 30. juli - 2007, kl.14.00**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 444386 – 744386.

# Lærari til Hovs skúla

Søkt verður eftir lærara til umleið 6-8 avlopstímar um vikuna fyri skúlaárið 2007-08.

Umsóknir skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 10. august og skulu sendast til Óla Johannesen, Sjógøta 118, 800 Tvøroyri.

Meira fæst at vita frá skúlaleiðaranum Óla Johannesen, telefon 272647.

Í Hovs skúla eru 4 næmingar, harav 2 í 4. flokki, 1 í ávíkavist 6. og 7. flokki.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**HOVS SKÚLI**




www.dkexport.dk



## Reservedele skaffes til

**Entreprenørmaskiner – Lastbiler**
**Busser – Maskiner m.m.**

Sender dagligt med skib / luftpost.

Entreprenørmaskiner købes og sælges

DKEXPORT.DK
IMPORT – EXPORT

**Tlf:** +45 7461 3940 **Fax:** +45 7461 4164
**Mobil:** +45 2027 0064 **e-mail:** johnny@dkexport.dk

# Tørvar tær timburmann?

**Ring á tlf. 21 93 18**

**J.T.D. SMÍÐ**

# SUMMARFRÍ

*Salongin er stongd frá 30. juli til 20. august.*

***Harraklipp í Vágsbotni***